# Ongar rulliskoytur – takk!

Tá Sosialurin var í Kalsoynni, vitjaðu vit inni í handlinum á Húsum. Ein sera hugnaligur bygdarhandil. Meðan vit bíðaðu eftir at Dora kom at tosa við okkum, løgdu vit merki til eitt heldur øðrvísi skelti, sum hekk á vegginum

HANDIL
*Solby A. Eliasen*

**Húsar:** Tá Sosialurin kemur inn í handilin hjá Doru — Dora sigur, at tað er maðurin, sum eigur handilin – er ongin at síggja. Ein hurð stendur opin út í eina gongd. Har hoyrist onkur, og vit bíða bara. Onkur man fara at vísa seg. Ein ung kvinna kemur fram, men verður standandi í hurðini. Eg hugsi um hatta man vera Dora. Men tað er tað ikki, tað er ein kundi. Hon spyr okkum, um vit skulu hava fatur á Doru, og tá vit játta, letur hon seg úr skónum og fer upp í gjøgnum einar trappur úti í gongini. Helst mundi hon fara at boða Doru frá, at fólk var í handlinum.

Meðan vit bíða, standa vit og hyggja okkum um inni í handlinum. Har eru nógv ymisk at fáa. Har eru lutir av ymsum slag, barnaklæðir umframt matvørurnar, fruktina og góðgæti. Eg hyggi at nøkrum barnasokkum, har eru allar støddir líka frá stødd 17 og upp til 45.

Tá eg vendi mær aftur, fanga eyguni hjá mær eitt skelti á vegginum. Tað er ein barnatekning. Eitt par av rulliskoytum við einum krossi yvir, soleiðis at skilja, at tað ikki er loyvt at koma inn í handilin í rulliskoytum. Men tað, sum ein veruliga beit merki í, var barnaskriftin uppi yvir tekningini. Við stórum stavum stóð skrivað RUGLISKOYTIR.

Eg mátti smílast við, tí eg helt hetta vera avbera fitt og ein góður máti at gera vart við, at rulliskoytur ikki eru ynsktar inni í handlinum.

Nú hoyrast fótafet aftur í trappunum. Hesuferð eru tað bæði Dora og tann unga kvinnan. Hon rindar fyri tað, sum hon hevur keypt og fer so víðari. Tað sær út, sum hon ber postin út í oynni — í øllum førum eftir taskuni at døma.

Dora hyggur smílandi upp á okkum og byrjar beinanvegin at tosa við okkum, sum um vit kennast væl. Tað er sera hugnaligt, og ein kennir seg vælkomnan.

Tá eg spyrji um skeltið, sigur hon, at tað eru dóttir hennara og tann yngri sonurin, sum hava staðið fyri hesum meistaraverkinum.

Meðan vit práta um hetta, kemur annað av listarfólkunum inn. Sonurin. Hann er púra ósmæðin og spyr, hvørji vit eru, og hvar vit koma frá. Ein sera fittur unglingi, sum er framligur á ein dámligan hátt. Hann er tíðindafróur og greiðir sjálvur frá, at hann hevur skrivað, meðan systirin hevur teknað.

- Eg helt, at hatta var so fitt, at eg hongdi tað upp í handlinum og tað er so blivið hangandi, sigur Dora og smílist upp á átta ára gamla sonin, sum sær út til at vera errin av tí.



*Dóttirin hjá Doru og tann yngri sonurin gjørdu hetta skeltið, sum hongur í beint innan fyri dyrnar til handilin á Húsum*

## Bøkur um Lóu




Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út smábarnabøkurnar Lóa skal sova og Lóa í skóginum eftir Lene Fauerby og Mette Kirstina Bak. Niels J. Thomsen týddi.

Hetta eru tvær fittar søgur um lítlu gentuna Lóu, og um hvussu gerandisdagurin hjá henni er: Í fyrru bókini fer hon í song, skal busta tenn og lata seg í náttklæði. Pápin skal lesa søgu, men hann er móður, og tað er Lóa ikki. .

Í seinnu fer Lóa túr í skógin saman við mammu og pápa. Har er ein stórur stakkur av viðarbulum, sum Lóa klintrar uppá. Men so missir hon suttuna....

Bøkurnar eru 28 bls. í litum hvør, innbundnar og kosta kr. 30 hvør í bókabúðunum. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Jógvan Hugo Gardar, Oslo, hugoga@online.no
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Ein søgulig hending sum fekk stóran týdning

Nei, eg hugsi ikki um hendingina sum øll skulu hoyra um og minnast komandi mikudag. Hendingin sum eg her hugsi um er so mikið gomul, at hon var við at fara í gloymibókina. Tað var ein tíðindamaður sum fann út av at her var ein merkisdagur sum ikki átti at fara í søguna. Hetta var hóast alt ein hending sum hevur havt ávirkan á hvønn einasta norðmann sum hevur livað síðani 1902. Og tað er oftani so, at vit minnast kríggj, vanlukkur og tá fyrsti amerikumaður setti fótin á mánan. Men nakað sum er nær og er ein partur av gerandisdegnum hava vit hug til at gloyma..

Tað eg her tosi um er eitt glas. Men ikki eitt tilvildarligt glas, men sjálvt ”Norgesglasset”. Á lokinum stendur Norge, harav navnið. Í 100 ár hava norðmenn — og nakrir føroyingar — súltað og hermetiserað ber, frukt og annað gott í noregsglasinum.

Tað var Hadeland Glassverk som í 1902 fór í holt við at framleiða noregsglasið. Tá var Norra framvegis ein partur av tí svensk-norska samveldinum. Norra fekk ikki sítt frælsi fyrrenn í 1905.

Tá ein blaðmaður herfyri ringdi til Hadeland Glassverk og spurdi um tey skuldu hátíðarhalda 100 ára dagin, so vistu tey ikki hvat tey skuldu svara. Tey vóru ikki greið yvir, at tað vóru 100 ár síðani glasið kom á marknaðin. Eitt sindur løgið haldi eg, tá ein sær hvat handilslívið annars velur at hátíðarhalda. Nýggir handlar hava ”jubileum” bæði tá teir eru eitt og tvey og trý ára gamlir.

Og Hadeland Glassverk hevur á hvørjum ári eitt ella annað sum tey hátíðarhalda. Men teirra mest selda glas, noregsglasið, hava tey gloymt. Havi sjálvur sæð kjallarar hjá fleiri í familjuni hjá konuni. Har eru hundratals noregsgløs í øllum støddum. Millum glaslokið og glasið verður ein gummiringur lagdur og so verður lokið fest niður á glasið við einum jarnringið.

Tey, á Hadeland Glassverk, eru í dag meir upptikin av at framleiða fín gløs. Húsarhaldsgløs eru ikki so spennandi. Og so eru tað neyvan tey nógvu sum súlta og hermetisera í dag.

Í dag verða gløsini sum oftast brúkt til at leggja hindber, jarðber ella blommur í — antin sum súltutoy ella sum omaná. Krákuber og kirsuber vera eisini løgd í gløsini — so mamma kann gera sós til jólaísin og pápi sín jólalikør. Á jólum blanda nógvir norskir pápar sín jólalikør við egnum berum og heimabrendum brennivíni.

Seinast í sjeytiárunum vóru tey sum súltaðu og hermetiseraðu so mikið fá, at ikki loysti seg hjá Hadeland Glassverk at halda fram við framleiðsluni.

Sum sagt so er ikki so vanlig í dag at súlta og hermetisera á sama hátt sum fyri 20-30 árum síðani, so tá mamma hevur súltað ber og aðrar fruktir, so brúkar pápin restina av gløsunum til at fylla tey við skrúvum, møtrikkum og seymi. Tað er sjálvandi eisini ein máti at súlta uppá.

Men eg rokni við, at tá vit nærkast jólum so kemur Hadeland Glassverk við sínum ”100 ára noregsglasi”, sum allar mammur í Noregi fáa í gávu á jólum.



UTTAN ÚR HEIMI

# Álopið fer at lata Helvitis portur upp


*Leiðarin í Arabisku Samgonguni, Amr Moussa, ávarar um, at eitt amerikanskt álop á Irak fer at lata Helvitis portur upp*

**Arabiska Samgongan ávarar amerikanarar ímóti at leypa á Irak. Samstundis lupu hundrað amerikansk og bretsk flogfør á irakskar loftverjuskipanir**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Londini í Arabisku Samgonguni hava á fundi í Kairo umrøtt ta spentu støðuna millum USA og Irak. Aftan á fundin segði formaðurin í samgonguni, Amr Moussa, at tann arabiski heimurin ávarar USA ímóti at seta sína álopsætlan í verk

– Vit fara at gera okkara at forða fyri, at hetta kríggj verður veruleiki, tí eftir okkara tykki verða dyrnar til Helviti latnar upp í Miðeystri, verður kríggið veruleiki, segði ein sera avgjørdur Amr Moussa aftan á fundin.

Hann legði afturat, at Irak eigur at laga seg eftir samtyktunum hjá ST og at lata vápnaeftirlitsmenninar sleppa aftur til arbeiðis.

Bert fáar tímar eftir, at fundurin hjá Arabisku Samgonguni var liðugur, lupu umleið hundrað amerikansk og bretsk flogfør á loftverjuskipanir í Irak. Sambært bretskum hernaðarkeldum søktu flogførini serliga at høvuðsstøðini, sum umsitur loftverjuna har vesturi í Irak. Bretsku keldurnar siga, at álopið var ætlað sum svar upp á irakskan ágang.

Vesturlendskir hernaðarserfrøðingar hava fyrr sagt, at ætla amerikanarar at senda herfólk til Irak, fara teir helst at leypa á vestaneftir.

# Kunnu hava vápn við sær umborð á flogfarið

**Amerikanska senatið hevur við stórum meiriluta samtykt, at flogskiparar á ferðamannaflogførum kunnu hava vápn hjá sær**

FLOGFERÐSLA
*Árni Joensen:*

Stjórnin hjá Bush forseta var upprunaliga ímóti at loyva flogskiparunum at hava vápn við sær umborð á flogfarið, tí stjórnin bar ótta fyri, at tiltakið kundi fáa óhepnar avleiðingar fyri trygdina. Men nú senatið við stórum meiriluta hevur samtykt, at flogskipararnir skulu hava loyvi at taka vápn við sær til arbeiðis, hevur stjórnin valt at slaka.

Hvítu Húsini siga, at flogskipararnir sleppa at hava hondvápn hjá sær, men tey skulu goymast í einum skríni frammi í stýrihúsinum. Lagt verður afturat, at flogskipararnir fáa ikki loyvi at hava vápn hjá sær, fyrr enn teir hava verið til skjótivenjing.

Felagið hjá flogskiparunum hjá American Airlines tekur undir við hugskotinum um at lata flogskipararnar hava vápn umborð á flogfarinum. Ein talsmaður hjá felagnum heldur tað vera løgið, at stjórnin upprunaliga var ímóti at geva flogskiparunum vápnaloyvi, tí á hvørjum ári ferðast fleiri túsund vápnaðir løgreglumenn við teimum amerikansku flogførunum. Vit hava ikki hoyrt stjórnina tosa um, hvussu trygg hendan skipanin er, sigur talsmaðurin hjá flogskiparunum.

Flogfeløgini vilja ikki hava vápn umborð á flogførini. Leiðslurnar í 21 amerikanskum flogfeløgum royndu at fáa senatið at fella uppskotið. Í einum brævi til senatorarnar skrivaðu flogfeløgini m. a., at tað má sigast at vera løgið, at myndugleikarnir nýta milliardir dollarar til tess at forða fyri, at nakar sleppur umborð á eitt flogfar við vápnum, og at somu myndugleikar samstundis loyva drepandi vápnum í hesum somu flogførunum.

Myndugleikarnir hava roynt at sissa ferðafólk. M. a. er avgjørt, at hvør einasti av teimum umleið 85.000 amerikansku flogskiparunum skal kannast væl og virðiliga, áðrenn hann fær loyvi at hava vápn í flogfari sínum.

## Stoiber í eggjaroki

Kanslaravalevnið hjá kristiligu demokratunum í Týsklandi, Edmund Stoiber, hevði nóg mikið við at verja seg, tá víðgongd vinstrasinnað mótstøðufólk tveittu egg eftir honum í Hamburg hóskvøldið.

Løgreglan noyddist at leggja uppí, og fýra fólk vórðu tikin.

Mótmælisfólkini róptu ókvæmisorð eftir Stoiber. Tey hildu, at Týskland hevur havt nóg nógvar vanlukkur í seinastuni, og at fólkinum tørvar ikki Stoiber oman á alt tað, sum hevur verið.

## Ikki 20. flogrænarin

Fronsku myndugleikarnir vilja vera við, at Zacarias Moussaoui skuldi ikki taka lut í yvirgangsatsóknunum at World Trade Center og Pentagon, soleiðis sum amerikanarar vilja vera við. Moussaoui hevur sitið í fongsli í USA í fleiri mánaðir, tí CIA og FBI vilja vera við, at hann skuldi taka lut í atsóknunum.

Fronsku myndugleikarnir siga harafturímóti, at tann tikni skuldi taka lut í nøkrum atsóknum, sum al-Qaeda ætlaði at seta í verk tíðliga í ár. Hetta siga fransmenn seg hava fingið at vita, eftir at teir hava avhoyrt fleiri limir í al-Qaeda seinastu mánaðarnar.

Franska løgreglan sigur, at hon hevur fylgt Zacarias Moussaoui í fleiri ár. M. a. vita fransmenn, at hann var á venjingarlegu í Afghanistan.

## Carter við atfinningum

Fyrrverandi amerikanski forsetin, Jimmy Carter, finst at framferðini, sum fangarnir á herflotastøðini Guantanamo á Kuba fáa.

Í einari grein í Washington Post ávarar fyrrverandi forsetin amerikanarar ímóti at broyta ta vanligu amerikansku uppfatanina av mannarætindunum. Hann vil vera við, at tað eru sterkar konservativar kreftir, sum royna at røkka sínum málum við at nýta bardagan ímóti yvirgangi sum undanførslu.

Jimmy Carter vísir á, at Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri hevur sagt, at fangarnir úr Taliban verða ikki latnir leysir, sjálvt um teir verða funnir ósekir. Fyrrverandi forsetin skrivar, at hetta minnir um mannagongd hjá stjórnum, sum amerikanskir forsetar altíð hava fordømt.

## Mintust OL-morðini

Týskarar mintust hósdagin 30 ára dagin fyri tilburðin, tá palestinskir yvirgangsmenn myrdu ellivu ísraelsk ítróttarfólk, sum vóru á olympisku summarleikunum í Múnchen.

Tað vóru limir í felagsskapinum Svarta September, sum rændu ísraelsku ítróttarfólkini. Yvirgangsmenninir skutu tvey av ítróttarfólkunum og kravdu, at 200 palestinskir brotsmenn skuldu latast leysir úr ísraelskum fongslum. Eftir drúgvar samráðingar gjørdi týska løgreglan av at herja á yvirgangsmenninar. Úrslitið gjørdist eitt blóðbað. Ellivu ísraelsk ítróttarfólk, fimm yvirgangsmenn og ein týskur løgreglumaður doyðu.

Nógvir føroyingar munnu minnast tilburðin fyri 30 árum síðani, tí Útvarpið var á staðnum. Mong munnu minnast táverandi útvarpsstjóran, Niels Juel Arge, siga frá tí, sum hendi.